MENTAMÁLASTÝRIĐ
VINNU- OG MIÐNÁMSSKÚLADEILDIN

**Dagur:** 14. desember 2001
**Máltal:** 44202/2/011216/4

**Handilsskúlin**

*Lærugreinakunngerð* *Desember 2001*

# ALTJÓĐA BÚSKAPUR
# B-STIG

*Endamálið*

**1.** Endamálið við undirvísingini er at næmingurin
- a) mennir vitan sína um altjóða búskap í samfelagsligum høpi, soleiðis at hann gerst førur fyri at útgreina sambandið millum teir ymsu partarnar av búskapinum, bæði í Føroyum og uttanlands,
- b) við at fáa innlit í búskaparlig ástøði og háttaløg kann lýsa, greina og meta um búskaparligu gongdina í Føroyum og í øðrum londum og sjálvstøðugt kunna taka dagar ímillum búskaparliga politikkin í ymsum samfeløgum, og
- c) fær innlit í búskaparligar spurningar og eina fatan av altjóða handli og øðrum samskifti landanna millum.

*Undirvísingin*

**2.** Næmingurin skal
- a) duga at útvega, greina, tulka og meta um upplýsingar í føroyska og altjóða búskapinum,
- b) kunna nýta einfaldar myndlar til at greina búskaparligar spurningar og bindingar,
- c) duga at nýta tøknifrøðilig amboð til at stuðla og menna fakliga førleikan, og
- d) duga at nýta viðkomandi framløguhættir.

*Innihaldið í undirvísingini*

**3. 1** Undirvísingin skal fevna um dagførd dømi ella tilfar, so at faklig ástøði og háttaløg verða nýtt í ítøkiligum høpi. Á hendan hátt verða búskaparligar broytingar í Føroyum samanbornar við broytingar, sum samtíðis henda í øðrum londum.

**3.2** Ástøðiligir myndlar verða nýttir, men høvuðsdenturin verður lagdur á verkligar uppgávur.

**4.1** Í sambandi við teir 6 høvuðstættirnar, ið nevndir eru í 4.2-4.7, verða lisnar einar 425 síður.

**4.2** *Føroyar í altjóða búskapi*
Føroyar verða lýstar sum ein búskapur við egnum uttanlandshandli, men ikki egnum gjaldoyra. Støðd og samanseting av uttanlandshandlinum verður greinað. Næmingurin


MENTAMÁLASTÝRIĐ • HOYVÍKSVEGUR 72 • POSTRÚM 3279 • FO-110 TÓRSHAVN
(+298) 35 50 50 • (+298) 35 50 55 • MMS@MMS.FO

skal duga at skilja altjóða arbeiðsbýtið, og hvussu búskapargongdin í einum landi kann ávirka búskapargongdina í einum øðrum landi.

Næmingurin skal læra um orsøkirnar til uttanlandshandilin og hvønn leiklut altjóða handilsavtalur hava á gongdina í uttanlandshandlinum. Í hesum høpi verða fiskivinnuavtalur og aðrar avtalur, Føroyar hava við onnur lond, viðgjørdar.

Við hagtølum úr tjóðarroknskapum verður sambandið millum búskapargongdirnar í Føroyum og umheiminum lýstar, og lært verður at greina gongdina í gjaldsjavna og uttanlandsskuld. Sambandið við tær roknskaparligu uppgerðirnar av tjóðarúrtøku og tjóðarinntøku verður viðgjørt, og mett verður um týdningin av hesum støddum sum vælferðarmát. Umframt tjóðarroknskap verða eisini umhvørvisroknskapir umrøddir.

Næmingurin skal duga at skilja, hvat tað er, sum hevur ávirkan á, hvussu búskaparliga gongdin (konjukturурin) verður, hvussu hon spreiðir seg millum tjóða, ávirkar korini hjá tí almenna, hjá vinnuni og hjá borgaranum í okkara landi. Arbeitt verður við dagførdum taltilfari.

Gongdin i fólkatalinum, búskaparliga vøkstrinum og livilíkindum hjá fólki verður greinað. Eisini verður búskaparliga gongdin í londum ella bólkum av londum samanborin. Menningin í búskapum, sum eru fyri stórum vøkstri, verður gjølligari viðgjørd. Í hesum sambandi verða spurningar um árin á umhvørvið og tilfeingið umrøddir.

**4.3** *Fyritøkurnar í altjóðabúskapinum*
Prístilgongdin undir fríari kapping verður útgreinað og samanborin við prísásetingina á einkarsølumarknaði, og munir á prísgyrði á úti- og heimamarknaði verða ávístir. Prís- og avgjaldspolitikkur verður viðgjørdur og mett verður um fylgjurnar av politiskari uppílegging í marknaðarmekanismuna.

Arbeitt verður við, hvussu fríu marknaðarkreftirnar ávirka býtið av tilfeinginum í samfelagum. Mett verður um, hvussu hetta ávirkar tilgongdina í føroyska vinnubygnaðinum sammett við onnur lond.

**4.4** *Húshaldini í altjóðabúskapinum*
Húshaldsinntøkur, nýtsla og samansparing, eins og nýtslusamanseting, nýtslu- og uppsparingskvotur verða lýstar í samfelgsbúskaparligum høpi. Lønartilgongdin á privata arbeiðsmarknaðinum verður skilgreinað við støði í marknaðarlæruni og samanborin við lønaravtalur á almenna arbeiðsmarknaðinum.

Gongdin í arbeiðsstyrki, vinnufrekvensum og arbeiðsloysi verður greinað og mett verður um arbeiðsloysi í altjóða høpi.

**4.5** *Fíggjarheimurin*
Undirvísingin fevnir um penga- og fíggjarstovnar, sum heima ella millumtjóða arbeiða við at lána pening, keypa og selja virðisbrøv.

Eftirspurningur og útboð á peningamarknaðinum verða viðgjørd og kannað verður, hvat ávirkar rentustigið.

Pengapolitikkur verður viðgjørdur í innlendskum og millumtjóða høpi.

Kunnað verður um, hvussu gjaldoyravirðið verður ásett. Hetta verður síðan kannað nærri, og fylgt verður við gongdini í virðinum á krónuni.

Næmingurin skal eisini læra um nakrar gjaldoyravirðisskipanir, hvørji endamálini eru, og hvørjar fylgjur standast av førdum politikki á økinum.

**4.6** *Hin almenni sektorurin*
Arbeitt verður við almennum roknskapum og fíggjarlógum. Gongdin í landskassaskuld og fíggingin av henni verður greinað og samanborin við altjóða mát.

Gongdin í skatta- og útreiðslubygnaði verður greinað og sammett við broytingar í samfelagsbúskapinum sum heild. Eisini verður tilgongdin í ES-samstarvinum lýst. Mett verður um fíggjar-, útjavningar og umhvørvispolitisku avleiðingarnar av skatta- og útreiðslubygnaðinum.

Inntøkuskapanin í samfelagum verður greinað við makrobúskaparmyndlum, har multiplikatorávirkanin verður ávíst. Í hesum sambandi verður eisini undirvíst í prísvøkstri við atliti at uppruna og ávirkan á samfelags- og millumtjóðabúskapin, og mett verður um broytingar í nýtsluprístalinum sum mát fyri prísvøkstri.

Ósambæri í búskaparpolitisku málsetingini verður ávíst, og mett verður um møguleikarnar fyri at røkka sett mál við ymsum politiskum atgerðum. Í hesum sambandi verða millumtjóða avmarkingar og bindingar á búskaparpolitikkinum viðgjørdar. Eisini verður undirvíst í skiftandi hugburðum og áskoðanum viðvíkjandi búskaparpolitiskari stýring.

**4.7** *Sjálvvalt evni*
Í undirvísingarárinum verður arbeitt við sjálvvaldum evni, sum verður valt í samráð við flokkin; alt eftir ynskjum, áhuga og tørvi. Sjálvvalda evnið kann vera eitt framhald av einum evni, ið er viðgjørt í flokkinum, eitt samfelagsbúskaparligt evni ella eitt evni, sum er partur av einum tvørfakligum samarbeiði. Sjálvvalda evnið fevnur um umleið 15 % av undirvísingartíðini.

*Próvtøkan*

**5.** Hildin verður ein munnlig próvtøka.

**6.1.** Munnliga próvtøkan fevnir um próvhoyring í lisnum tilfari. Próvtakarin fær umleið 40 minuttir til fyrireikingar, og tá er vegleiðing og tilfarsútflýggjan íroknað. 3 próvtakarar verða próvhoyrdir um tíman, íroknað próvdøming.

**6.2** Fyri næmingar, ið fara til próvtøku eftir vanligum treytum, er próvtøkupensum umleið 350 síður.

**6.3** Fyri sjálvlesandi og næmingar, ið fara til próvtøku eftir serligum treytum, er próvtøkupensum tað sama sum lesipensum sambært **4.1**.

**6.4.** Próvtakarin fær ein próvtøkuspurning, sum er býttur sundur í undirspurningar. Próvtøkuspurningarnir skulu vera fjølbroyttir og umboða tað, ið lisið er.

**6.5.** Próvtøkuspurningarnir skulu geva næminginum møguleika at vísa síni evni til at lýsa, greina og meta á fakligan hátt.

**6.6.** Í dømingini av avriki próvtakarans verður dentur lagdur á, at hann hevur hollan kunnleika til evnið, sum próvhoyrt verður í, at hann dugur at vísa á viðkomandi dømi, og at framløga hansara er sjálvstøðug.

**7.** Givið verður 1 próvtal fyri munnliga avrikið. Próvtalið verður givið við støði í einari heildarmeting.